Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52 a í Tingskipanini

Spyrjari: Sirið Stenberg, løgtingsmaður

Svarari: Sólvit Nolsø, landsstýrismaður í almannamálum

Evni: Sparingar í Almannaverkinum

Spurningar:

1. Hvussu nógvar borgarar fara sparingarnar í Almannaverkinum at raka? Biðið verður um tøl fyri ymisku tænasturnar so sum umlætting, stuðul og hvussu nógv fólk fáa skert tænastustøði.

2. Kann landsstýrismaðurin upplýsa, hvussu ymisku bíðilistarnir til tænastur í Almannaverkinum síggja út, býtt á tal á fólki til ymisku bíðilistarnar?

3. Fara skerjingarnar í tænastustøðinum at standa við, hóast eykajáttanarumbønin, sum liggur í Fíggjarnevndini, verður samtykt?

4. Metir landsstýrismaðurin, at tað ber til at gera sparingar í Almannaverkinum soleiðis, at tær ikki raka tænastuna til borgaran við serligum tørvi?

Viðmerkingar:
Fyrr í vikuni fekk eg svar frá landsstýrismanninum um, at sparingar verða framdar í Almannaverkinum. Hetta fer m.a. at raka fólk við serligum tørvi meint, tí at umlætting verður skerd, stuðulstænastan verður skerd, og tænastustøðið lækkar sum heild. Orsøkin er, at játtanin fyri 2022 bleiv skerd í fíggjarlógini fyri jól.
Tó sigur svarið m.a. onki um, hvussu nógv fólk verða rakt av sparingunum. Tí hesar uppfylgjandi spurningar til landsstýrismannin.
Spurningurin er eisini, um tað ber til at gera sparingar aðrastaðni í Almannaverkinum soleiðis, at tænasturnar til fólk við serligum tørvi ikki verða raktar. Í hesum sambandi er neyðugt at kenna tænastustøðið og bíðilistar í løtuni.
Í løtuni er ein umbøn um eykajáttan í Fíggjarnevndini. Tí er neyðugt at vita, um sparingarnar fara at standa við, hóast eykajáttanin verður veitt.

Á Løgtingi, 8. apríl 2022

Sirið Stenberg